# Brandvenjing í einum skúla.

**At umrøða á lærarafundi.**

Hvussu ljóðar brandklokkan i skúlanum?

Í skúlanum skal vera brandalarmanlegg ella klokka, t.d. skúlaklokkan, sum hoyrist allastaðni í bygninginum.

Avtalast skal, at tá ið klokkan ringir áhaldandi er hetta tekin um at eldur er í. Avtalast skal, hvørji taka sær av næmingunum og hvør skal hugsa um bygningin.

Alment.

Tann ið verður varugur við eld ella royk, skal frá nærmasta staði ringja innanhýsis brandalarm og samstundis ringja 112 at boðsenda sløkkiliðinum, t.d frá lærarastovuni ella frá skrivstovuni hjá skúlaleiðsluni, alt eftir sum hetta hóskar seg best fyri skúlan. Adressan til skúlan skal vera greið og eintíðug, eisini fyri ikki staðkunnug fólk.

Tað er sera umráðandi, at sløkkiliðsmanningin kennir skúlan, hvussu hann er innrættaður, hvar serskúlastovur eru, t.d. fysikkstovan, og hvar fýrrúmið er. Eisini er umráðandi, at sløkkiliðið kennir brunaligu sundirskilingarnar i skúlanum, t.d. brandhurðar og brandveggir.

Lat gera eina lættskiljandi (einstriku) tekning at hanga á høgligum alment tilgongdum stað, sum vísir hvar sløkkiútger er, t.d. hondsløkkjarar, slanguskáp og hvar nærmastu uttandura brandpostar eru.

Tá ið eldur er í skal hvør lærari fylgja sínum flokki til møtistaðið (eitt fast avtalað stað), har allir flokkarnir skulu standa i skipaðari rekkju, soleiðis at mantal kann haldast av hvørjum flokki. Tá hetta er avgreitt kunnu næmingar og lærarar, sum kunnu vera um næmingarnar fara til avtalað høli ella bygning, sum skúlaleiðslan vísir á.

Sigið næmingunum frá, hvussu bjargingarskipanin í øllum liðum er samansett. Hetta kann gerast góður førleiki hjá næmingum fyri lívið.

Innanhýsis skipan.

Í skúlanum skal vera uppslag á lærarastovuni við hesum upplýsingum:

1. Tá ið eldur er í ringir klokkan (soleiðis)_________________
2. Staðið/støðini at ringja brandalarm innanhýsys er/u
   _____________________________________
3. Staðið/støðini at ringja við telefon, 112, eftir sløkkiliðinum er/u
   __________________________
4. Lærari skal beinan vegin kanna eftir hvar og um roykur er úti á gongini.

**Arbeiðs- og brunaeftirlitið . Eirargarður 2, 2. Hædd, FO-100 Tórshavn**
**Tlf. +298 664400 . www.arb.fo . arb@arb.fo**

5. Lærari skal sum seinastur fara úr klassanum og lata hurðina aftur eftir seg. Ikki læsa!
6. Fyri hvørjari skúlastovu skal gerast greitt, hvar nærmasta útgongd/neyðútgongd er.
7. Eru aðrir flokkar longu á gongini og har gerst knappliga ov trongligt, so drála eitt lítið sindur.
8. Latið flokkar næst útgongdini koma fyrst út.
9. Øll nýtast ikki at fara út sama veg.
10. Latið klæðir hanga og skúlating verða har tey eru.
11. Syrgið fyri, at næmingar og lærarar ganga burtur frá útgongdum og neyðútgongdum fram til møtistaðið beinan vegin, soleiðis at hesi á ongan hátt sperra rýmingarleiðirnar.
12. Latið skúlastjóran, ella fólk, ið hann setur til tað, standa fyri sløkkiliðinum, tá ið tað kemur og gev leiðaranum allar neyðugar upplýsingar um hvar eldur/roykur er.
13. Kemur eldur í, sum fólk verða varug við beinan vegin skal hann sløkkjast beinan vegin við útgerðini á skúlanum.
14. Kann eldur ikki sløkkjast lættliga av starvsfólkum/lærarum, so latið hurðina aftur til rúmið og setið brandalarmplanin í verk.
15. Av og á skal tosast sínámillum og við næmingar um brandplanin, nevnið hvar sløkkiútgerð er, hvaðani alarmurin verður settur í gongd, hvat er vanlig høvuðsútgongd, hvar neyðútgongd er, hvar bjargingarop eru (vindeygu at lata upp), hvar møtiplássið er og at rýmast skal hóliga tann vegin har minst roykur er og t.d., at oftast er minni hiti og roykur niðri við gólvið.
16. Rættið brandplanin av og á og gerið hann so greiðan sum tilber.
17. Fólkatrygdin er mest umráðandi.
18. Er tal á næmingum og er greitt, at eingi eru inni, so kann sløkkiliðið bert samla seg um tey byggiligu viðurskiftini og hugsa um eldsbrunan.
19. Tá ið sløkkingin er avrikað gevur skúlaleiðslan boð um, at farast kann inn í bygningin.
20. Er vánaligt veður, kalt, regn, kavi vindur, skal avtalast, hvar næmingar skulu hýsast og verða, til boð verða givin um at farast kann heim til hús ella inn í skúlan aftur.
21. Havast má ein ætlan fyri at hava næmingar í varveitslu til, í givnum førum, foreldur hava fingið boð um, at koma eftir sínum børnum.

Skúlastjórin ella varamaður hansara skal hava boð um, um allir næmingarnir eru komnir út og, um so er, at onkur manglar.

Upplýsast skal, hvar viðkomandi møguliga kann/kunnu verða stødd. Eisini skal, um gjørligt, upplýsast honum hvar eldur er í ella hvaðani roykur kemur frá.

Hesir upplysningar skulu veitast brunaumsjónarmanninum, sløkkiliðsleiðaranum, tá ið hann kemur.